ÍF-SÍ:

# Meistarabrak á Kambsdali

**Meistaraheitið skal avgerast í meistaradeildini hjá kvinnum, tá ÍF tekur ímóti SÍ. Vinnarin av dystinum kann rópa seg nýggjan føroyameistara**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*ÍF og SÍ møtast í einum rættiligum oddabraki leygardagin, har vinnarin fer avstað við meistaraheitinum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Lagt verður upp til eitt stórt og endaligt brak í høllini á Kambsdali leygardagin, tá numamr eit og nummar tvey í meistaradeildini hjá kvinnum bresta saman. Her tekur oddaliðið, ÍF, ímóti SÍ, og undan dystinum er slett einki avgjørt í oddinum. Eitt er tó greitt, vinnarin verður nýtt meistaralið.

Gongdin hjá ÍF hevur verið sera góð í endaspælinum. Av fyrstu níggju dystunum hevur ÍF vunnið sjey, og tí eru tær at finna á ovastu rók í meistaradeildini hjá kvinnum. Einastu liðini, sum ÍF hevur tapt fyri, eru SÍ og KÍF

Gongdin hjá SÍ hevur verið á leið tann sama, sum tann hjá ÍF. SÍ hevur eisini vunnið sjey av fyrstu níggju dystunum í endaspælinum, so hesi bæði liðini hava fylgst væl í oddinum í seinnu hálvu av landskappinginum. SÍ apti fyrra dystin ímóti TB í endaspælinum, og so taptu tær ímóti Drátti fyri trimum vikum síðani.

### SÍ verið við yvirlutan

SÍ og ÍF hava møtt hvørjum øðrum tríggjar ferðir áður í hesum kappingarárinum, og m.a. møttust iðini tvær ferðir í grundspælinum. Fyrri dysturin í grundspælinum var í Sørvági, og hesin dysturin bleiv sera spennandi. Her vann ÍF fyrstu tvey settini, men so kom SÍ sterkt aftur og vann næstu tvey settini. So skuldi javnbrótari til, og her vann ÍF rættiliga trygt.

Í seinna dystinum var tó vent í holuni. Nú var slett eingin ivi um úrslitið, tí SÍ vann henda dystin sannførandi 3-0, og tann sigurin var eisini fult uppiborin.

Liðini hava eisini møtt hvørjum øðrum einaferð í endaspælinum, og var hesin dysturin í høllini í Sørvági. Aftur hesaferð eydnaðsit SÍ at vinna og úrslitið gjørdist 3-1. SÍ vann fyrstu tvey settini, men so skapti ÍF eitt sindur av spenningi í aftur, tá tær vunnu triðja sett. Fjórða sett gjørdist ein sannur gysari, men her vann SÍ 26-24, og so vunnu sørvágskvinnur tann dystin.

Samanumtikið hevur SÍ havt yvirtakið á ÍF í hesum kappingarárinum, men hetta kemur neyvan at hava nakran týdning, tá liðini koma á vøllin leygardagin.

## Mjølnir fær silvurkrúnurnar

Leygardagin tekur Mjølnir ímóti Fram í meistaradeildini hjá monnum, og her skal Mjølnir taka ímóti silvurkrúnunum. Í løtuni eru teir tvey stig frammanfyri Fram, og tí hevur Fram møguleika at koma uppá sama stigatal sum Mjølnir. Settmunrin hjá Mjølni er tó so nógv betri, at Fram hevur ongan møguleika at koma forbí teir. Framleikararnir fara tó ikki tómhentir heim, tí teir fáa nevniliga bronsuheiðursmerkir.

## Stjørnan á finalukós

Stjørnan tekur ímóti StÍF í seinnu hálvfinaluni í Sunset kappingini leygardagin, og her er Stjørnan væl á veg at koma í finaluni. Stjørnan vann nevniliga fyrra dystin við 10 málum, og tí skal ganga av skriðuni, um tær ikki koma í finaluna. Dysturin verður leygardagin kl. 15 í KÍ-høllini.

## Bert æruna at spæla fyri

Tey bæði niðastu liðini í Atlantic Airways kappingini møtast í seinasta umfarinum sunnudagin, tá ið H71 tekur ímóti Neistanum. Liðini hava sum so einki at spæla um, og tí hevur hesin dysturin ikki tann stóra týdningin. Einasta, sum kann henda, er, at Neistin kann fara eitt pláss longur upp eftir stigatalvuni. Hetta hendir, um KÍF tapir dystin ímóti StÍF, og Neistin vinnur ímóti hoyvíkingum.

ÍF-SÍ:

# Toppur og botnur á Kambsdali

**Besta mansliðið hjá ÍF í flogbólti fær gullkrónurnar um hálsin, tá teir taka ímóti botnliðnum, SÍ, í seinasta umfari í hesum kappingarárinum**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møtast í høllini á Kambsdali leygardagin, tá ið ÍF tekur ímóti SÍ í meistaradeildini hjá monnum. Dysturin hevur sum so ongan týdning fyri nakað av liðunum, tí í øðrum endanum hevur ÍF tryggjað sær meistaraheitið, meðan SÍ í hinum endanum ikki hevur nakran møguleika at koma av aftasta plássinum.

Gongdin hjá ÍF hevur verið avbera góð í endaspælinum, og einasti svipsarin kom, tá teir taptu 3-2 ímóti Fram. Hesin ósigurin skapti rættiligan spenning í aftur bestu mansdeildini, men næstseinasta vikuskiftið settu fuglfirðingarnir alt uppá pláss sjálvir, tá teir vunnu trygt á Mjølni í Klaksvík.

Hjá SÍ hevur ikki gingið so væl. Teir hava bert vunnið ein dyst í endaspælinum, men í flestu dystunum hava teir tó tikið sett frá mótstøðuliðunum.

Tað er ikki óhugsandi, at vit koma at síggja eitt rættiliga ótraditionelt ÍF-lið í dystinum leygardagin. Kappingin um Løgmanssteypið fer nevniliga í gongd í fótbóltinum, og tí er ivamál um fleiri av leikarunum. Bartal Eliasen, Hanus Eliasen, Áslakur R. Petersen og Árni Petersen spæla allir fótbólt, og harafturat hevur Boban Ilic verið skaddur. Hvussu er og ikki, so kann úrslitið fyri so vítt gera tað sama fyri ÍF, tí teir hava longu vunnið meistaraheitið.



Hevur tú hug at arbeiða á einum almennum stovni, har arbeiðsdagurin ikki stendur stillur og uppgávurnar eru nógvar og fjølbroyttar – ja so hava vit júst brúk fyri tær!

Ergoterapeutur / Fysioterapeutur til Hjálpartólamiðstøðina

Á HTM er eitt fyribilsstarv sum ráðgevandi / málsviðgerandi Ergoterapeutur / Fysioterapeutur leyst at seta frá 01. apríl 2007 til 31. mars 2008, við møguleika fyri føstum starvi aftaná hetta. Talan er um fulltíðarstarv á 40 tímar um vikuna.

**Vit søknast eftir einum starvsfelaga, sum hevur**
- útbúgving sum ergoterapeutur / fysioterapeutur.

**Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur**
- royndir frá líknandi arbeiði
- kunnleika til at arbeiða við fólki við niðursettum førleika
- kunnleika til almannalóggávuna
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- góð evnir at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- teldufførleika á brúkarastøði.

**Vit kunnu bjóða**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flekstíð
- tætt samstarv við starvsfelagar
- tvørfakligt samarbeiði
- fakligt mennandi umhvørvi.

**Løn og setanartreytir**
Sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM, á tel. 358300.

**Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til**
Hjálpartólamiðstøðina,
Postboks 1049, 110 Tórshavn,
ella við telduposti til
htm@almannastovan.fo.

**Umsóknarfreist**
Fríggjadagin 23. mars 2007.

htm@almannastovan.fo · www.almannastovan.fo

HTM

HTM er stovnur undir Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 12 fólk á HTM. Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.: 1) upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar. 2) útlán og endurnýtslu av hjálpartólum. 3) viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar. 4) tvørfakligt samstarv – innan- og uttanhýsis.

KREA.FO - TEL. 47 80 80